**Kvæðatilfar - Nr: 17**

# Læraravegleiðing

**Vegleiðandi floksstig:** 4. - 7. flokkur

**Uppgávuslag / heiti:** Spurnarkapping

**Vegleiðing:**

Endamálið er, at næmingurin skal kunna seg við søgugongdina og nærlesa tekstin.

Brestis kvæðið verður býtt upp í hesar yvirskriftir. Soleiðis nýtist næminginum ikki at leita runt í øllum tekstinum eftir svarinum. Brotini eru í hóskandi longd til at lesa heima.

| | | | |
|---|---|---|---|
| Partur 1 | Ørindi | 1 - 10 | Avstaðferðin |
| Partur 2 | Ørindi | 11 - 16 | Í Lítlu Dímun |
| Partur 3 | Ørindi | 17 - 30 | Kappróðurin |
| Partur 4 | Ørindi | 31 - 48 | Bardagin |
| Partur 5 | Ørindi | 49 - 60 | Illstøðan og endin |

Til hvønn partin eru gjørdir tíggju spurningar. Lærarin býtir flokkin upp í bólkar, sum skipa fyri sína egnu innanhýsis spurnarkapping.

Eisini kunnu næmingarnir hvør sær svara spurningunum skrivliga.